Løgtingslóg

um

leigustuðul

Treytirnar fyri leigustuðli

§ 1. Húski, sum býr til leigu sambært leigulógini í sjálvstøðugari íbúð við egnum køki, og sum ikki eigur aðra fastogn, ið kann nýtast sum bústaður, hevur rætt til leigustuðul sambært hesi løgtingslóg, sbr. tó § 2.

Serlig undantøk

§ 2. Persónur, sum býr í einum leigubústaði, ið er fevndur av kapitli 6 í almannalógini, hevur ikki rætt til leigustuðul.
Stk. 2. Húski, ið leigar ein bústað frá einum ella báðum foreldrum ella verja hjá einum av persónunum í húskinum, hevur heldur ikki rætt til leigustuðul.

Leigustuðulsupphæddin

§ 3. Leigustuðulin er 20% av húsaleiguni sum ásett í leigusáttmálanum, men í mesta lagi 1.500 kr. um mánaðin, sbr. tó §§ 4 og 5.

§ 4. Fyri húski við einum persóni yvir 18 ár lækkar leigustuðulin við 5% av inntøkugrundarlagnum, sum er omanfyri 350 túsund kr.
Stk. 2. Fyri húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár lækkar leigustuðulin við 5% av inntøkugrundarlagnum, sum er omanfyri 500 túsund kr.
Stk. 3. Verður leigustuðulin sambært stk. 1 ella 2 lægri enn 300 kr., fellur stuðulin burtur.

§ 5. Inntøkugrundarlagið hjá húskinum verður roknað sambært § 7 í løgtingslóg um familjuískoyti.
Stk. 2. Persónur yngri enn 23 ár, ið sambært Landsfólkayvirlitinum er skrásettur at búgva saman við einum ella báðum foreldrum sínum ella saman við sínum verja, telur hvørki við í talið á persónum yvir 18 ár í húskinum ella í inntøkugrundarlagið hjá húskinum sambært § 4.

§ 6. Upphæddin í § 3 og inntøkumørkini í §§ 4 og 5 verða javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Umsókn og útgjald

§ 7. Umsókn um leigustuðul skal latast Almannaverkinum á serligum oyðublaði saman við avriti av undirskrivaðum leigusáttmála.
Stk. 2. Almannaverkið kann krevja nærri upplýsingar og skjalprógv fyri, at treytirnar fyri stuðlinum eru loknar.
Stk. 3. Almannaverkið kann útvega sær upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um leigustuðul frá TAKS, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi myndugleikum.

§ 8. Leigustuðul verður veittur frá mánaðinum eftir, at Almannaverkið hevur móttikið umsóknina, og verður rindaður mánaðarliga afturúr á kontu hjá einum persóni í húskinum.

Skjalprógv fyri útreiðslur

§ 9. Fyri hvørjar 12 mánaðir, eitt húski hevur móttikið leigustuðul, skal húskið mótvegis Almannaverkinum skjalprógva veruligu útreiðslurnar til húsaleigu seinasta

árið. Um slíkt skjalprógv ikki verður latið Almannaverkinum innan ásetta freist, kann Almannaverkið steðga útgjaldinum av leigustuðli, inntil nøktandi skjalprógv er móttikið.

Fráboðanarskylda

§ 10. Húski, sum móttekur leigustuðul, hevur skyldu til skjótast gjørligt at boða Almannaverkinum frá broytingum í viðurskiftum, sum kunnu ávirka rættin hjá húskinum til stuðulin.

Stuðul móttikin av órøttum

§ 11. Hevur ein persónur móttikið leigustuðul av órøttum, og átti hann at verið vitandi um hetta, skal upphæddin rindast Almannaverkinum aftur. Tað sama er galdandi, um orsøkin er vantandi ella skeivar upplýsingar frá persóninum, sum viðkomandi hevur havt skyldu at lata Almannaverkinum.
Stk. 2. Almannaverkið kann gera avtalu við skuldaran um afturgjaldsskipan. Í sambandi við avtalur um afturgjaldsskipan kann Almannaverkið útvega sær upplýsingar um ognarviðurskifti hjá skuldara frá TAKS og øðrum viðkomandi myndugleikum.
Stk. 3. Afturgjaldskrav sambært stk. 1 kann krevjast inn við panting ella afturhaldast í A-inntøkuni.
Stk. 4. TAKS fremur sambært stk. 3 panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum og afturheldur í A-inntøku sambært reglunum um lønarafturhald í skattalógini.

Kæra

§ 12. Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærari hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Revsing

§ 13. Er ikki harðari revsing ásett eftir revsilógini, verður persónur, sum annaðhvørt tilætlað ella av grovum ósketni letur Almannaverkinum skeivar upplýsingar sambært § 7, stk. 1 ella 2 ella § 9, 1. pkt. í løgtingslógini, ella sum ikki heldur fráboðanarskylduna sambært § 10, revsaður við sekt.

Gildiskoma

§ 14. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. september 2026.

Broyting í almannalógini

§ 15. Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur (Almannalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022, § 6 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, løgtingslóg nr. 154 frá 19. desember 2023, løgtingslóg nr. 45 frá 27. mars 2025 og løgtingslóg nr. 180 frá 20. november 2025, verður í § 21, stk. 4, aftan á "familjuískoyti" sett: ", leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul".

Broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

§ 16. Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við § 8 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður í § 12, stk. 6 aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul verður ikki mótroknaður í stuðulsveitingini."

Broyting í løgtingslóg um familjuískoyti

§ 17. Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21.

desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022, løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023 og løgtingslóg nr. 162 frá 20. desember 2023, verður í § 7, stk. 3, 2. pkt. aftan á "avlamisveiting" sett: ", leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul".

Broyting í skattalógini

§ 18. Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, løgtingslóg nr. 39 frá 16. mai 2024, løgtingslóg nr. 145 frá 20. desember 2024 og løgtingslóg nr. 75 frá 30. apríl 2025, verður í § 29, nr. 13 sum litra g sett:
"g) Leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul."

Samtykt á Løgtingi hin 28. mai 2026 við 28-1-1 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 28. mai 2026

stjóri

LM-106/2025